gult10 cyan10 magenta10 svart10



FISKIVINNUTÍÐINDI

## Helvtin av norska ídnaðarfiskinum er svartkjaftur

Norðmenn veiða ídnaðarfisk til olju og mjølframleiðslu fyri tilsamans 822.754.000 norskar krónur. Hesi tølini eru trý ára gomul og hetta er meira enn ein tvífaldan seinastu tíggju árini. Økingin stavar frá, at norðmenn eru farnir at veiða meira av svartkjafti og svartkjafturin er í dag meira enn helvtin av norsku ídnaðarveiðuni. Men myrk skýggj hótta fyri framman, tí ovurveiða eftir svartkjafti hóttir hendan ævintýrkenda vøkstur.

## Nógvur fuglur undir Føroyum

Í seinastu viku endurgóvu vit ein fiskifrøðing fyri at siga hvussu neyvt samband tað er millum gróður í sjónum og lívið í sjónum. Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt samanberingar millum gróðurin í sjónum og lomvigatalið í Skúvoy.

Allastaðni frá í Føroyum ljóðar frá stórum flokkum av svartfugli. Tað er ikki óvanligt at síggja eini 30 fuglar í einum flokki og nóg mikið er at eta. Fiskurin er fullur av nebbasild og hesa etir lomvigin eisini.

## Svartkjafturin er ovurfiskaður

Gýtingarstovnurin av svartkjafti er næstan bara tvey ára gamal fiskur í løtuni. Ongantíð fyrr er skrásett so lítið av eldri fiski og tí verður verri at spáa um framtíðina og hvussu nógv kann takast av stovninum.

Yvitlitstrolingar hjá norðmonnum í mars og í apríl sýna, at stovnurin er minkaður. Hetta er eitt úrslit av, at nógv hevur verið veitt av svartkjafti. Avleiðingarnar av hesum eru, at vit ikki kunnu rokna við jøvnum fiskiskapi eftir svartkjafti í framtíðini. Fiskifrøðingar hava stórar trupulleikar av gera metingar av stovninum í framtíðini.

Norðmenn siga, at fiskiskapurin eftir svartkjafti í framtíðini verður nógv tengdur at hvussu stór tilgongdin er. Hon hevur verið sera góð seinastu árini, men við so stórum veiðutrýsti vil hetta broytast og vit kunnu rokna við munandi minni kvotum.

## Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

Hálvt fjórða tons varð selt um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin

| Syslunummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 367 | Báran | snella | 215 |
| FD 775 | Langanes | snella | 744 |
| FD1148 | Hellisberg | snella | 385 |
| KG 106 | Barið | snella | 248 |
| KG 243 | Gudrun | gørn | 46 |
| KG 423 | Jaspissteinur | snella | 310 |
| KG 472 | Helliklettur | snella | 63 |
| KG 512 | Neshamar | lína | 195 |
| KG 832 | Borgin | snella | 224 |
| VA 181 | Vesturtúgva | partrol | 975 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Hýsa 2 | 13 |
| Hýsa 3 | 23 |
| Hýsa 4 | 3 |
| Havtaska 0 | 280 |
| Kalvi 2 | 34 |
| Kalvi 4 | 2 |
| Kongafiskur 0 | 484 |
| Longa 0 | 14 |
| Reyðsprøka 0 | 8 |
| Steinbítur | 152 |
| Toskur 1 | 19 |
| Toskur 2 | 109 |
| Toskur 3 | 745 |
| Toskur 4 | 967 |
| Toskur 5 | 180 |
| Tunga 0 | 21 |
| Upsi 2 | 38 |
| Upsi 3 | 199 |
| Upsi 4 | 114 |

## Stríðast um svartkjaftin

Norðmenn og ES eru sera ósamd um hvussu teir skulu býta svartkjaftastovnin. ES krevir 58 prosent av svartkjaftastovninum, men hevur ongantíð veitt meira enn 20 prosent av samlaðu veiðuni í Norðuratlantshavi. Ísland hevur ongantíð fiskað meira enn trý prosent av samlaðu veiðuni, men krevir 20 prosent.

Noreg krevir veiðurættindi, sum svara til 37 prosent av veiðuni. ES heldur, at Noreg ikki eigur at fáa meira enn 12 prosent av samlaðu veiðuni.

## Svartkalvakvotan uppi á Flemmish Cap

Føroysku trolararnir Enniberg og Vesturvón gjørdu skjótt á Flemmish Cap á hesum sinni. Teir høvdu ikki meira enn góð 60 tons inni, tá heildarkvotan var uppfiska. Enniberg er farin í Irmingarhavið at royna eftir kongafiski og Vesturvón er heim komin. Teir fara at gera til at fara eystur eftir.



Flestu skúlabørnini í Klaksvík fóru í gjár við Smyrli til Havnar

## Skúlabørnini rýmdu úr Klaksvík

**750 skúlabørn í Klaksvík fóru í gjár til Havnar at vitja umborð á Logos II. Smyril var leigaður at flyta børnini til Havnar og heimaftur**

ÚTFERÐ
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Fyrrapartin í gjár rýmdu flestu skúlabørnini í Klaksvík úr skúlastovunum og fóru útferð til Havnar.

Endamálið við ferðini var at vitja umborð á Logos II, sum hevur ligið í Havn farnu dagarnar.

Um hálvgum ellivu fóru tey umleið 750 skúlabørnini úr skúlanum á Ziskatrøð og við Ósánna marsjerandi út í Klaksvíkina, har Smyril legði at stutt fyri klokkan ellivu.

Lærarar og skúlabørn skuldu vitja umborð á Logos II í gjár, og seint seinnapartin skuldi Smyril flyta tey mongu børnini heimaftur til Klaksvíkar.

## Marjun nýggjur skúlastjóri á Argjum



*Marjun Holm, sum er 41 ára gomul, verður nýggjur stjóri í Argja skúla. Hon starvast sum lærari í Tórshavnar kommunuskúla*

SKÚLAMÁL
*Eirikur Lindenskov*

1. august fær Argja skúli nýggjan stjóra. Tá tekur Marjun Holm við starvinum.
Marjun Holm, sum er 41 ára gomul, er úr Havn. Hon tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1985, og hevur hon m. a. verið lærari á Føroya Fólkaháskúla frá 1985-87.
Seinastu árini hevur hon verið lærari við Tórshavnar kommunuskúla, men hon hevur eisini verið á ársskeiði á Danmarks Lærerhøjskole. Umframt tað hevur hon tikið onkrar handilsútbúgvingar, m. a. innan virkisbúskap og leiðslu. Hon hevur eisini tikið skeið innan kunningartøkni og hevur undirvíst á eftirútbúgvingini á læraraskúlanum.
Marjun Holm tekur við sum skúlastjóri á Argjum eftir Mortan Dalsgarð, sum hevur sagt seg úr starvi. Hann hevur verið skúlastjóri á Argjum síðani 1979.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Kvæðamentanin aftur vunnið sær heiðurspláss

**-Í dag er ressandi og gleðiligt at síggja, at føroyska kvæðamentanin aftur hevur vunnið sær sítt rætta heiðurspláss. Dansimentanin er lyft upp aftur á eitt hægri støði. Hon er skipað. Dansifeløgini leggja karmarnar, fyri at brúka samfelagsfrøðilig hugtøk. So stendur hvørjum frítt at dansa og kvøða eftir egnum ynski. Nú fer hesin mentaarvur ongan veg. Tit hava tryggjað hann segði Heðin Mortensen, formaður í Mentamálanevnd Tórshavnar Býráð, tá hann setti landsdansistevnuna í Havn herfyri. Vit prenta røðu hansara**



*Heðin Mortensen, formaður í Mentamálanevndini setti stevnuna*

KVÆÐAMENTAN
**Heðin Mortensen**



*Frá landsdansistevnuni í Havn herfyri*

*Myndir Jens K. Vang.*

Góðu dansarar, gott mentafólk!

Tórshavn bjóðar tykkum øllum hjartaliga vælkomnum til býin, her tit koma at seta tykkara dám á býarmyndini hesar dagar, dansistevnan varar. Her eru komin kvinna og maður úr øllum ættum í Føroyum, til sjálvi at njóta og at sýna fram fyri øðrum okkara størsta mentunararv, føroyska dansin.

Í 1870 sat mentamaðurin V. U. Hammershaimb á prestagarðinum í Lyderslev í Danmark og undraðist á, hvussu nøkur fá fólk á nøkrum kørgum oyggjum í Atlantshavi kundu hava eitt so ríkt andslív. Skipað skúlagongd hevði eingin verið. Einki høvdu tey fáu, sum dugdu væl at lesa, at lesa á sínum egna móðurmáli. Men kortini tóktist andaligi førningurin at vera so nógv størri í Føroyum enn aðrastaðir.

Hammershaimb undraðist eisini á, hvussu týskarin Carl Johan Graba eftir eina ferð í Føroyum í 1830 hámetti andliga kunnleika føroyinga so nógv, at hann kundi siga, at »hann heldur vildi práta við ein føroying í ein hálvan dag, enn at tosa við ein týskan bónda í ein hálvan tíma!«

Heimstaðarkunnleikin var stórur. Kristindómskunnleikin tað sama. Og málið yvirlivdi í kvæðunum og teirri undirvísing, børn sum vaksin fingu heima í roykstovuni. Tann samlaða føroyska mentanin bygdi á ein gjøgnumførdan heimstaðarkunnleika, kristindóm, kvæði og vísur, søgu og sagnir.

So sterk var henda samansjóaða eind gjøgnum tíðirnar, at danska undirvísingarverkið einki formáddi sær. Ein útbúgvingarskipan undir Fríðrikki Fjórða kongi miseydnaðist fullkomiliga. Tá vit í 1845 fingu eitt sokallað »provosoriskt reglemang fyri almúuskúlan í Føroyum«, sum vanlig fólk vórðu tvingað at góðtaka, so vísti úrslitið seg skjótt við, at prestarnir klagaðu um, at konfirmantarnir hvørki dugdu at lesa ella skriva. Og tí varð í 1854 farið aftur til, at foreldrini høvdu ábyrgdina av útbúgvingini.

– Tá eg var smádrongur, var ikki vanligt, at børn sluppu í dans. Men eg minnist væl fyrstu ferð, eg slapp í barnadans í Havn. Hetta var eitt framúr gott tiltak í Sjónleikarhúsinum, har børnini lærdu stev, lærdu at kvøða og hoyrdu søgur og sagnir. Frá hesi tíðini minnist eg serliga væl tað megnar arbeiði, teir báðir Jóannes av Skarði og Magnussen Apotekarin saman við øðrum løgdu í at læra okkum børn at virða henda stóra mentanararv.

Seinni, tá eg var blivin vaksin, minnist eg serliga mánakvøldini, tá navigatørarnir settu sín dám á føroyskan dansin í Sjónleikarhúsinum. Tað var almennur dansur. Hann kundi vera misjavnur. Men stundum lyfti hann seg upp til tað hátíðarliga og andborna, sum bara vit, sum vóru, eru og verða góð við dansin kunnu uppliva. Hesa kenslu eiga tey, sum ikki enn hava upplivað hana, enn tilgóða.

Hendan innføring, vit ungdómar í Havn fingu í 50- og 60-unum í føroyska dansinum, var ein avbjóðing, bæði tað at vera við og fylgja við. Hetta havi eg verið glaður um seinni í lívinum, tí tað hevur gjørt meg føran fyri at fylgja við í menningini og betur at skilja ta stóru framgongd, sum føroysku kvæðamentanini hevur verið fyri seinnu árini.

– Kvæðini gjørdust meira enn nakað annað grundvøllurin undir føroyska málinum. Kvæðini høvdu sín fasta form, bæði í orðum, vendingum og mállæru. Hammershaimb brúkti tey, tá hann evnaði skrivtmálið til. Gamli Grundtvig metti tey hægri enn íslendsku søguhandritini, tí kvæðini livdu á mannamunni og vóru hvørsmansogn.

Tey løgdu lunnar undir bæði sálmaskaldskap og fosturlandsskaldskap. Tann føroyski samleikin, sum kvæðaskaldskapurin átti høvuðsleiklutin í, var orsøkin til, at vit seinnu fingu føroyskt inn um bæði kirkju- og skúlagátt.

Føroyski dansurin hevur ikki altíð havt tað lætt. Longu Svabo skrivaði, at dansurin í teimum frægaru brúdleypunum í Havn var við at vera avlagdur til fyrimuns fyri nýmótans dansir, sum tá vóru uppi í tíðini. Hetta var einahandilstíðin, tá nógv skip komu við vørum, og nógvir útlendingar komu við fremmandum siðum og ljóðførum til landið.

Hyggja vit at almennu støðuni til føroyska dansin seinni, t.d. fyri umleið stórthundrað árum síðani, so hevði kvæðamentanin trong kor. Útlendskir siðir floymdu inn yvir okkum, og í langa tíð knarraðu fólk um, at føroyski dansurin var nýttur sum skálkaskjól fyri rúsdrekkamisnýtslu. Henda fatanin – ella misfatanin – gjørdi vart við seg í mong ár eftir rúsdrekkaskamtanina og helt mongum góðum kvøðara, um hann hevði sloppið at roynt seg, frá at leggja sítt til, at dansurin hevði gingið betur í fleiri bygdum. Tí hvat kann vera skeivari enn at geva føroyskum dansi skuldina fyri, at fólk ikki duga sær hógv.

Í dag er ressandi og gleðiligt at síggja, at føroyska kvæðamentanin aftur hevur vunnið sær sítt rætta heiðurspláss. Dansimentanin er lyft upp aftur á eitt hægri støði. Hon er skipað. Dansifeløgini leggja karmarnar, fyri at brúka samfelagsfrøðilig hugtøk. So stendur hvørjum frítt at dansa og kvøða eftir egnum ynski. Nú fer hesin mentaarvur ongan veg. Tit hava tryggjað hann. Kvæðini hava vunnið innaftur um skúlagátt. Vit síggja blómandi dansifeløg, sum við at brúka kvæðini varðveita tey og harvið okkara størsta mentanararv. Jú fleiri tey eru, sum á ungum árum fáa høvi til at uppliva at læra at kvøða og dansa, jú fjølmentari verður tann ringur, sum stendur saman um dansin og ber hann inn í framtíðina.

Og vit síggja hábærslig fólk í hundraðtali í føroyskum búna, sum á ein serstakan hátt undirstrikar, at her er álvara aftanfyri. Dansurin er aftur viðurkendur sum nakað serstakt føroyskt, nakað hábærsligt og virðiligt.

Tey, sum fyri stórthundrað árum síðani knarraðu um føroyska dansin, sum átalaðu, at valla ein út av hundrað tordi at bera føroyska búnan í mannamúgvu – tey høvdu verið errin at staðið her í dag. Og tey høvdu sæð, at sjálvt minstu ímyndingar og gitingar teirra um eina doyggjandi mentan fullkomiliga eru gjørdar til skammar. Og tað vil eg veita tykkum dansifeløgum eina stóra tøkk fyri.

Føroyski dansurin er mentur í øllum samanhangum. Vit kunnu ikki ímynda okkum stevnurnar uttan dansin, Ólavsøkan vildi verið fátøk uttan – og tað er tykkum dansifeløgum fyri at takka, at tit ótroyttiliga – hóast kapping av øllum handa slagi – hava ment føroyska dansin. At hetta arbeiðið hevur borið ávøkst, síggja vit í dag, nú ungfólk aftur, kvinnur og menn í hóptali, duga at skipa og kvøða kvæði og vísur á tamb. Og tað síggja vit í dag við at hyggja út yvir hesa hábærsligu og stásiligu samkomu.

Persónliga kann eg siga, at ongantíð havi eg upplivað nakað so sermerkt føroyskt sum hetta, aldri havi eg sæð nakað so tignarligt sum hetta, og tí kann eg bara taka undir við Hammershaimb, sum gleddist um kurteisligu heilsanir føroyinga sínámillum, og sum dømi nevndi gomlu heilsanina:

»Góðir vegir liggi fyri tær. Gud gevi tær blíðan byr og sjógv!«



